## Klumman

Jákup Mørk
blaðmaður
jakup@sosialurin.fo

## Illir amatørar

Glaðir amatørar. Tað er hugtakið, sum vit vanliga hava fest á okkara ítróttafólk her í Føroyum. Ikki minst, tá ið vit tekna myndina av Dávidi móti Goliath. Júst sum vit gjørdu, tá ið italsku heimsmeistararnir vitjaðu á Tórsvølli. Og sum vit helst eisini gera, tá ið fronsku vara-ditto eisini koma at vitja seinni í ár.

Men hey. Her er nú okkurt, sum ikki ruggar heilt rætt kortini. Tí onkursvegna tykist strembanin eftir at vinna fyri ein og hvønn prís hava tikið fullkomuliga yvir innan ítróttina.

Í fótbóltinum stríddu B36 og KÍ sítt stríð fyri tveimum árum síðani. HB vann seg í fjør gjøgnum fútabann og hópkærur fram til eina fjórðingsfinalu, sum teir kortini taptu. Og tá starturin hjá Eysturoyingi ikki skikkaði sær heilt, sum teir vildu hava tað, varð hótt við at leggja bát og kappróður, tí manningin ikki fekk ta samkenslu, sum teir hildu seg hava uppiborið. Og í hondbóltinum vildu Kyndilsspælarar boykotta landsliðið, tí Kappingarnevndin ikki vildi akta tí, sum Kyndil kravdi.

Og vit sleppa ikki so. Nei, nú er aftur galið í heimligu fótbóltskappingini, har starnaða blekkið á Skála-penninum nú kann fáa avgerandi ávirkan á, hvussu gull og altjóða fótbóltsmilliónir skulu býtast, tá ið vit koma úr í oktober.

Aja. Tá var munur á ítróttafólkum okkara á Rhodos. Har vóru umstøðurnar nú ikki av teimum bestu, men hetta slapp nú ikki at spilla spælið kortini. Uttan at seta fram kærur av nøkrum slag, svumu, skutu og bardu tey seg til gull og æru.

Og tað er nú meira, enn sigast kann um fleiri av øðrum íðkarum okkara her á landi.

Amatørar? Jú, víst. Glaðir? ikki heilt. Kanska skuldi tað bara verið »illir amatørar«

skemt

# Farnir í luftina í Vágum

Seinasta vikuskiftið vitjaði Sosialurin við flúgvarabedingina í Vágum, og har tóku vit hesar báðar myndirnar omanfyri. Hvat hesir mennirnir gera, vita vit ikki, men stuttligt sær tað út.

*Viðgjørdar myndir: Birgir Waag Høgnesen*





## Leyst og fast um stórt og smátt

Meirilutin í Klaksvíkar Býráði i vildi ikki hava naka GERÐA-býti!

EB/Streymur við Arnbirni og Gert Hansen, Hanusi og Símuni Eliassen og Hans Paula og Ronnie Samuelsen ætlar at luttaka í BOYGGJA-leikunum!

Per Stig Møller við Høgna Hoydal: "Rhod os nu ikke ind i nogen flagstrid"!

Gott at grønlendingarnir ikki eisini búðu á Hotellinum á Rhodos - trý fløgg á einari stong hevði verið ov mikið!

Musikklærarnir royna framvegis at KOYRA á politikkarnir!

FSF-nevnd, ið viðger dómmaraseðlar: Navnanevndin!

Fótbóltsfjepparar kring landið halda, at aganevndin hjá FSF burdi itið "Skaðanevndin"!

## Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Gott goymistað**
... so hevur Zidane lagt hendingina aftur um hillarnar
*Vikublaðið*

**Nýggjur hvalur**
5 føroyingar og 3 útlendingar eru við Thor Chaser, og telja teir hval. Teir høvdu sæð bæði grind, »nebbasild« og døglingar.
*Dagur og Vika*

**Væl svomið, læknin**
Pál Weihe vann 1500 metrar við tíðini 15.48,45 sekund.
*Sosialurin*

**Innrás?**
Bíligar rækjur hótta Grønland
*Dimmalætting*

**Bara stuttligt við hvørt?**
Stuttligt at vera suðuroyingur undir oyggjaleikunum
*Portalurin*

**Ov lætt millum kvinnurnar**
Elspa Mørkøre nummar tvey og Jutta Thomsen var nummar fýra í 400 metrar frí fyri menn.
*Sosialurin*